TING-HELLAN

# Hungur ella yvirgang

## World Summit – stjórn

**Hesa vikuna hevur ST verið á alheims breddanum. Fyrst var talan um forfund til toppfundin, sum byrjaði mikudagin. Endamálið við toppfundinum er at bygnaðarbroyta ST, soleiðis at felagsskapurin kundi gerast meira tíðarhóskandi og eisini effektivur**

*Bogi Eliasen*



*Stjórnmálafrøðingur, cand.scient.pol*




*Nakað er komið burturúr, men ikki nokk.*

### Skuffandi forfundur

Forfundurin endadi sum nakað av einum vónbroti, tí semjan sum funnin var fram, til ikki var so víttfevnandi sum vónað og lagt upp til av m.a. Kofi Annan fyrr í ár, tá hann kom við visiónunum fyri framtíðar ST í upplegginum *In Larger Freedom.* Hetta var eitt uppskot sum limalondini skuldu taka støðu til, men nógvar hendingar rundan um hava eisini havt sína ávirkan. T.d. hava muturgølurnar í ST verið við til at minka um álitið á felagsskapin, at felagsskapurin ikki megnaði at røkka eini semju um Irak-spurningin og annars stirvnu mannagongdirnar. ST er enn í høvudsheitinum skipað, sum tá felagsskapurin bleiv stovnaður fyri 60 árum síðan. Heimurin var ein annar, stórveldini onnur og avbjóðingarnar aðrar. Aftaná ræðuleikarnar í heimskríggjunum báðum, og aftaná at Fólkasamgongan ikki megnaði at byrgja fyri 2. Veraldarbardaga, var semja um at skipa ST soleiðis, at trygd og stabilitetur var í hásæti og ikki rættvísi. Tí bleiv Trygdarráðið gjørt við føstum limum og við sýtingarrætti.

Forfundurin millum umboðsfólk hjá limalondunum, og sum skuldi hava eina semju sum stjórnarleiðararnir skuldu at taka støðu til á sjálvum toppfundinum, gekk illa. Ikki fyrrenn í seinastu løtu eydnaðis at semjast um ein tekst, sum øll uttan tvey lond kundu taka undir við. Semjan var tá ikki serliga víttfevnandi í broytingunum og fekk harðan kritik frá nógvum eygleiðarum. Kofi Annan sjálvur vísti eisini á, at hann sjálvur var vónsvikin, men at talan hóast alt var um nøkur fet fram eftir og at tað er sera torført at fáa 191 lond at semjast. Tó var hann sera harmur um, at eingin semja var um vápnaupping og um hópoyðingarvápn og segði at talan er um eina stóra skomm, at heimsins lond ikki kunnu semjast á hesum so týdningarmikla øki.

### Heimsins 2015 ætlan

Nógv arbeiði hevur verið gjørt um menning av fátækum londum, og semja er um at arbeiða eftir millenium goals, sum er heimsins 2015 ætlan. Her hevur stórt stríð staðist av, hvussu nógv ríkaru londini skulu brúka til menningarhjálp. M.a. ætlar USA ikki at koma uppá tey 0,7%, sum málið er. Semja er tó um at seta størri orku í at røkka hesum málum, og m.a. George Bush legði í síni røðu stóran dent á, at tað er neyðugt at menna menningarlondini, m.a. eisini í stríðnum ímóti yvirgangi, og hann segði at USA tekur landbúnaðarstuðulin av, um so er at hini ríku londini eisini gera tað, soleiðis at fátæku londini fáa møguleika at kappast á meira jøvnum føti á hesum øki.

### Trygdarráðið

Undan toppfundinum hevur størsti spenningurin verið, um broyting av Trygdarráðnum og um tað fór at eydnast at seta á stovn eitt mannarættindaráð. Kofi Annan hevði sjálvur tvey uppskot um broyting av Trygdarráðnum, soleiðis at tað gerst meiri nýtiligt og fer at ímynda valdsbýtið í heiminum í dag. Men føstu limirnir í Trygdarráðnum hava skumpað hetta hegnisliga uppskot til viks, og ikki sær út til at nakað fer at henda á hesum øki. Ein broyting av Trygdarráðnum krevur stuðul frá føstu limunum og serliga USA. USA sigur seg prinsipielt stuðla eini broyting tá tíðin er røtt, og tað er hon so ikki beint nú. Bert um ein heilt óvantað broyting verður á síðsta degnum á toppfundinum, sum er aftaná evstamark til hetta blaðið, verður nøkur broyting í Trygdarráðnum á hesum sinni.

### Yvirgangur

Lagt var upp til at ST skal meira í stríðnum móti yvirgangi. Í hesum sambandi skuldi ein semja gerast um hvat er yvirgangur. Ongin semja fekst um hetta uttan tað, at Aðalfundurin skal taka málið upp og royna at loysa tað.

### Friðarveitandi nevnd

Uppskot er frammi um at gera eina friðarveitandi nevnd, sum skal hjálpa londum, sum er ávegis úr vápnaðum stríði og kríggi. Sum so er semja um at nevndin skal setast, men ósemjan er um hvørt nevndin skal vera undir Trygdarráðnum ella undir Aðalfundinum. Serliga 3. heimslondini vilja hava størri ávirkan, og tí at nevndin skal vera undir Aðalfundinum.

### Fólkamorð

Semja er fingin um at størri dentur skal leggjast á arbeiðið at fyribyrgja fólkamorðum. Kofi Annan hevði skotið upp, at limalondini skuldi bindast til at fylgja ST tilmælum á hesum øki. Semja var um at seta upp eina slíka skipan, men ikki at hon skal verða bindandi fyri limalondini.

### Mannarættindaráð

Stór ónøgd er um mannarættindanevndina hjá ST. Lond, sum eru kend fyri píning, hava í veruleikanum forða framstigum á hesum øki, við at seta seg upp ímóti avgerðum í nevndini. ST hevði tí vónað at seta á stovn eitt ráð, har einans lond við virðing fyri mannrættindum kundu verða limir, og í minsta lagi soleiðis at limirnir skuldu veljast sum t.d. í Trygdaráðnum. Semja er um at gera eina nýggja nevnd, men ikki um hvussu og hvør kann ella skal verða limur.

### Handil og stuðul

Hóast fleiri felagsskapir, sum arbeiða við menningarhjálp eru vónbrótnir, at meira ítøkiligt ikki er komið burtúr at geva teim fátæku londunum ein veruligan møguleika í alheimsskipanini, so lovaði George Bush, at USA tekur landbúnaðarstuðulin av, um